Ársfrágreiðing 2015/2016

Aðalfundurin 28. apríl 2016

Ársfrágreiðing 2015/2016

Starvsnevndin
Í starvsnevndini sita teir av aðalfundinum valdu limir: Formaðurin/kvinnan og 4 limir.
Starvsnevndarlimir kunnu vera afturvaldir eina ferð.
Starvsnevndin skipar seg á fyrsta fundi eftir ársaðalfundin við næstformanni.

Øll viðkomandi mál verða viðgjørd í starvsnevndini, og hevur starvsnevndin ein fund um mánan, tó undantikið juli og desember.

Á fundi tann 17. juni 2015 skipaði starvsnevndin seg við Jørmund Foldbo sum næstformanni.

Tey, ið hava mannað starvsnevndina síðan seinasta aðalfund eru:
Tóra við Keldu, forkvinna
Jørmund Foldbo, n. formaður
Anna Dahl Olsen
Jákup Danielsen
Gudny Benjaminsdóttir

Skrivstovan
Tóra við Keldu hevur verið forkvinna í Meginfelag teirra, ið bera brek í Føroyum síðan seinasta aðalfund. Á skrivstovuni starvast Ása Olsen, sum er aðalskrivari. Anna Sjóvará skrivstovufólk 15 tímar um vikuna, og Guðrið Thomsen er reingerðarfólk á 7 tímar um vikuna. Heidi Egholm hevur hjálpt til á skrivstovuni eitt tíðarskeið.

Arbeiðsuppgávurnar á skrivstovuni eru sera nógvar og víðfevndar.

Nakað av arbeiði hevur verið viðvíkjandi hoyringsarbeiði í samband við lógarsmíð, broyting í lógum og kunngerðum. Fundarvirksemi við limafeløg, stovnar og politiskar myndugleikar.

Nógv fólk venda sær til MBF við fyrispurningum av ymiskum slag. Men so vítt møguligt átekur MBF sær ikki einstaklingamál, uttan so, at tað hevur serligan almennan áhuga. MBF metir eisini, at limafeløgini eru betur før fyri at loysa einstaklingamálini.

ST- sáttmálin, skuggafrágreiðing, niðurstøður úr ST og annars arbeiðið eftirfylgjandi hevur fylt nógv síðan seinasta aðalfund, og kemur framvegis at fylla nógv.

MBF arbeiðir miðvíst við at minna á niðurstøðurnar úr ST og fyri at ávirka almenna myndugleika, at arbeiða málvíst við at gera neyðugar broytingar , so at somu avbjóðingar ikki eru við, tá næsta skuggafrágreiðing skal gerast í 2019.

Føroyar er eitt av fýra Norðurlondum, og einasta sjálvstýrandi økið, ið hevur sent skuggafrágreiðing til ST. Í november 2015, varð Ása Olsen, aðalskrivari í MBF á Ráðstevnu í Malmø, har hon luttók í einari workshop fyri at greiða frá arbeiðinum hjá MBF við skuggafrágreiðingini.

MBF hevur fingið nýggja talgilda journalskipan, har alt, ið viðvíkur tí arbeiði, ið verður gjørt í MBF verður skrásett. Serliga eru tað parkeringskort og fylgjarakort, har MBF skal umsita sambært fyrisitingarlógini, og viðvíkjandi persónsupplýsingum, ið gera, at tað er neyðugt at felagið líkur treytirnar viðvíkjandi KT trygd.

MBF 35 ár
Í ár eru tað 35 ár síðan MBF varð sett á stovn. Í hesum sambandi verður stórt tiltak í Norðurlandahúsinum 20. mai kl. 12.30 til 15.30, har vit m.a. fara at hoyra ymiskar lívssøgur, sang og eisini koma fyrrverandi forkvinnur/-mann at luttaka. Eisini kemur Eyðgunn Samuelsen, landsstýriskvinna í almannamálum, og Rigmor Dam, landsstýriskvinna í mentamálum, at luttaka.

Í samband við dagin gevur MBF bók út um ST sáttmálan.

Fíggjarviðurskiftir
Stuðulin yvir fíggjarlógina fyri 2016 er 1,6 mill. Við støði í lóg um ítróttarvedding fær MBF tillutað 5% av veddingarpengunum. Upphæddin fyri 2015 var 645.000 kr. Vit hava ikki fingið at vitað enn, hvussu stór upphæddin fyri 2016 verður. Hesin peningur kemur bæði MBF og limafeløgunum til góðar. Tann upphæddin, ið MBF fekk einaferð um árið frá FUR fellur burtur, men kunnu limafeløgini nú sjálvi søkja um stuðul beinleiðis úr FUR.

Inntøkan av fylgjarakorti og parkeringskorti varð nakað lægri, enn vit høvdu mett, men koma umsóknir regluliga inn til skrivstovuna.

Býtislykilin
Sambært viðtøkunum hjá MBF, skal aðalfundurin taka støðu til býtið av fíggjarliga stuðlinum til limafeløgini, eftir at raksturin hjá MBF er frádrigin.

ST- sáttmálin
Nú arbeiðið við skuggafrágreiðingini mótvegis ST nevndini er liðugt á hesum sinni, kunnu vit nú av álvara arbeiða við niðurstøðunum, sum eru komnar frá nevndini til Føroya Landsstýrið.

AMR er farið undir eina tilgongd, har Ráðið fyri brekað møguliga verður umskipað soleiðis, at tað fær eina breiðari umboðan. Gongd er eisini í arbeiðinum fyri at skipa ein mannarættindastovn.

Bústaðarviðurskiftir
Í løtuni er stórur mangul uppá egnaðar bústaðir serliga í Tórshavn. Nógvir bústaðir eru í ringum standi og hava stórar avbjóðingar verið á Eirargarði, har búfólkini eru flutt orsaka av soppi. Landsstýriskvinnan í Almannamálum sigur, at tað nú eru settar 60 mió. av til at byggja egnaðar bústaðir til fólk, ið bera brek, komandi árini.

Arbeiðsmarknaður
Ása Olsen er stýrislimur í Dugna. Skúlin við Áir hevur nú broytt sítt virksemi, og er FHS útbúgvingin niðurløgd og orkan nýtt til ein fyrireikandi flokk.

Dugni er ein endurbúgvingarstovnur undir Almannamálaráðnum, sum er skipaður sambært viðtøkum frá 1. juli 2012. Endamálið hjá Dugna er millum annað at royna arbeiðsevnini hjá borgarum, ið eru vinnutarnaðir, og at skipa fyri arbeiðsvenjing, endurbúgving og umskúling, so vinnutarnað aftur kunnu fara til arbeiðis.

Visjónin hjá Dugna er, at øll sum fáa pláss á Dugna, skulu koma í útbúgving ella arbeiði.

Fountainhúsið
Endamálið er at stuðla eina áramálsásetta verkætlan at seta á stovn eitt arbeiðsrættað tilboð til persónar, sum eru sálarsjúkir ella hava sálarligar trupulleikar. Tilboðið hevur koyrt nú í tvey ár, og hevur hetta tilboð virkað væl.

Miðnámsútbúgving
Í august 2015 byrjaði ein flokkur av næmingum á serbreytini á Kambsdali, og í ár byrja flokkar bæði á Glasi og á Tekniska skúla í Klaksvík.

Atkoma
Til altjóða brekdagin legði Theresa Turiðardóttir fram úrslit av verkætlan, har Visit Tórshavn hevur kannað atkomumøguleikar til matstøð og gisting fyri fólk, sum sita í koyristóli.

Ein vestnorðurlendsk verkætlan innan atkomu til ferðavinnu er byrjað, og er ætlanin at gera eina hondbók um atkomu. Fyrsti partur av arbeiðinum verður eftir ætlan liðugt í 2016.

Hóast Teknmálstulkatænastan hevur fingið eina hægri játtan at seta skrivitulk, er skipanin við skrivitulki ikki rættiliga farin í gongd.

Viðvíkjandi sendingum í KVF, hevur MBF havt áhaldandi samskifti bæði við Mentamálaráðið og KVf fyri at vísa á tørvin á at sendingar verða tekstaðar og teknmálstulkaðar. Enn er langt á mál, men tó eru nakrir glottar at hóma.

MBF metir, at tað er sera umráðandi, at Felagið fyri hoyribrekað og Deyvafelag Føroya framhaldandi vísa á tørvin.

Fylgjara kort
Síðan skipanin varð sett í verk hava 205 fólk, ið bera brek, fingið fylgjarakort.
Tíðindi frá Smyril Line siga, at skipanin virkar væl. Annars hava vit ikki frætt um annað enn, at skipanin virkar væl allastaðni.

HNR og Rådet för Nordisk samarbejde
MBF er limur í HNR. HNR er Norðurlendskt felag fyri stóru meginfeløgini í Norðurlondum og sjálvstýrandi økjunum. Ráðið hevur tveir fundir um árið, ein um várið og ein um heystið. Komandi ár kemur MBF at hava formansskapin. Tey, ið sita sum umboð fyri tey norðurlendsku feløgini eru formenn/-kvinnur og aðalskrivarar í meginfeløgunum.

Rådet för Nordiskt samarbejde hevur verið virkið síðan 2013. Carita Bjørklund, ið var forkvinna, tá ráðið varð sett á stovn, sat sum umboð fyri MBF í ráðnum í 2013/2014. Nú er tað Tóra við Keldu, forkvinna, ið umboðar MBF í ráðnum. Ása Olsen, aðalskrivari, er tiltakslimur í ráðnum.

Í mars var ráðstevna í Helsinki í samband við, at ráðið hevði fund har. Á hesum fundinum fekk Tóra við Keldu møguleikan at sita í einum paneli, har hon kundi greiða frá, hvussu langt vit eru komin í Føroyum viðvíkjandi grein 33.3 og 4.3 í ST sáttmálanum.

Lógararbeiði
MBF fær nógv lógaruppskot til hoyringar. Vit hava skipað lógararbeiðið soleiðis, at allar lógir og kunngerðir, sum MBF fær til hoyringar, verða sendar út til øll limafeløgini. Feløgini hava møguleika at gera sínar viðmerkingar. Í flestu førum eru tað ongi ella bert einstøk feløg, ið hava sent okkum nakrar viðmerkingar. Limafeløgini hava somuleiðis møguleika fyri sjálvi at senda sínar viðmerkingar beinleiðis til myndugleikan, sum varðar av lógaruppskotinum, og hendan møguleika eru tað nøkur limafeløg, sum brúka. Annars sendir MBF hoyringssvar til øll lógaruppskot, sum koma til felagið.

Í samband við lógararbeiði møta umboð fyri MBF í ymisku løgtingsnevndunum, ið varða av lógaruppskotinum.

Formansfundir
Formansfundur var tann 19. november , har allir formenn fingu møguleika at greiða frá virkseminum í teirra felag og at nevna trý hjartamál. Onkrir formenn, ið ikki kundu møta til fundin, sendu skrivliga frágreiðing inn.

Niklas Heri Jákupsson frá Fegin hevði ein kveikjandi fyrilestur, og skipaði síðan fyri bólkaarbeiði. Bólkaarbeiðið endaði við, at forkvinnan fekk handað nøkur ynskir frá feløgunum.

Fyri at fylgja upp uppá tað, ið feløgini settu fram sum ynskir á fundinum í november, varð aftur skipað fyri formansfundi 27. januar.

Á hesum fundinum fingu formenn/-kvinnur møguleika fyri at kunna um, hvat var hent síðan fundin í november.

Umboð fyri Faroe Media hevði upplegg um branding. Limafeløgini hava fingið tilboð uppá nýggja heimasíðu fyri ein rættiliga rímiligan prís.

Onnur tiltøk
Í ár fekk forkvinnan í MBF heiðurin at seta Ólavsøkuna 2015, ein heiður, ið fellur fáum í lut.

Tann 3. desember skipaði MBF fyri tiltaki í Norðurlandahúsinum saman við Ráðnum fyri Brekað og AMR.

MBF blaðið
Í 2015 kom eitt blað út.
Blaðið snúði seg um skipanina við fylgjarakortum ,sSerbreytina í Hoydølum og um atkomu til sendingar í KVF.

Tað er Rit & Ráð við Torfinn Smith, sum skrivar flestu greinarnar, og sum annars tekur sær av øllum viðvíkjandi útgávuni. Blaðið verður sent út til allar viðkomandi almennar og privatar stovnar og myndugleikar umframt til fólk, ið hava ynskt at fáa blaðið.

Heimasíðan
MBF fekk nýggja heimasíðu í september 2014. Tað er sera umráðandi fyri meginfelagið at hava eina virkna heimasíðu, sum umframt at verða virkin er nútímans.

Húsið
Í 2015 varð málað inni.

Umboðan í Ráðum og nevndum

Ráðið fyri brekað
Formaðurin í MBF er føddur limur í ráðnum. Sum varalimur fyri hana situr Ása Olsen, aðalskrivari í MBF. Sum umboð fyri MBF situr harumframt Uni Rasmussen frá Blindafelagnum og Óli Wolles frá Javna sum varaumboð.

Ljóðbøkur
Margreta Næss hevur sitið sum MBF umboð í nógv ár, og virkar hon dagliga sum samskipari av arbeiðinum við at framleiða ljóðbøkur.

Ráðið fyri ferðslutrygd
Herit Joensen, Vestmanna, situr sum MBF umboð, og hevur hon verið umboð í ráðnum í nógv ár.

Serflutningsskipanin
Ása Olsen, aðalskrivar í MBF, situr sum MBF umboð og skrivari í stýrinum fyri Serflutningsskipanina.

Psykiatriska sjúklingakærunevndin
Fyri MBF situr Sámal Lindenskov, sálarsjúkrarøktari og leiðari á sambýlinum í Eysturstræti, og sum varalimur situr Súna Mørk, limur í nevndini í Sinnisbata.